## 100.000 krónur til G!

**G! Festivalurin hevur fingið játtað 100.000 krónur í norðurlendskum stuðli. Festivalurin hevur seinastu trý árini fingið samanlagt 550.000 krónur frá Norðurlendska Mentanargrunninum**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Nordisk Kulturfond hevur gjørt av, at grunnurin stuðlar G! Festivalinum aftur í ár. G! Festivalurin fær hesaferð 100.000 krónur í stuðli, og upphæddin er serliga ætlað til ferðaútreiðslur hjá norðurlendskum tónleikarum, sum koma á festivalin.

Hetta er triðja árið á rað, at G! Festivalurin fær stuðul frá Norðurlendska Mentanargrunninum, og samanlagt hevur festivalurin í Gøtu fingið 550.000 krónur úr grunninum hesi árini.

### Bara norðurlendskt

Eitt av krøvunum, sum Mentanargrunnurin setir er, at minst trý norðurlond skulu verða umboðað, og tað er eingin trupulleiki hjá G!, tí har eru øll nøvnini, sum higartil eru avdúkað, norðurlendsk.

Blue Foundation og Nephew úr Danmark, Beats and Styles og Darude úr Finnlandi, Hjálmar úr Íslandi, og so føroysku Makrel, 200 og Teitur Lassen

Fyrireikararnir av G! Festivalinum siga, at í næstum verða fleiri nøvn avdúkað – bæði føroysk og útlendsk.

### Seinasta árið

Tað er ikki vanligt, at Nordisk Kulturfond letur stuðul í fleiri ár á rað til sama tiltak, men í serstøkum førum verður hetta gjørt fyri at verða við til at byggja upp nýggj, virðismikil tiltøk. Tá er hægst talan um trý ár.

Tað merkir sostatt, at hetta er seinasta árið, at G! fær stuðul frá Norðurlendska Mentanargrunninum.

– G! Festival takkar fyri, er errin um, og tekur tað sum eina álitisváttan, at tiltakið er so høgt í metum millum norðurlendskum myndugleikar, at vit hava fingið játtað stuðul í 3 ár á rað frá grunninum. Vit fara at gera alt okkara besta at liva upp til álitið, siga fyrireikararnir í tíðindaskrivi.



*Tað verður ein samanbrestur í bæði moll og duri, tá ið stór tónleikatiltøk skulu haldast kring alt landið á Jóansøku*

# Jóansøkan verður garvill

**Føroyingar ganga næstan amok við stórum tónleikatiltøkum seinasta vikuskiftið í juni. Ársins Songrødd, Nósabarnaprixið, Jóansøkufestivalur, Sandoyarfestivalur, stórar gospelkonsertir og Beatles-konsert eru á skránni somu dagar. Fyrrverandi fyriskipari heldur, at hetta er garvilt, og stórur vandi er fyri, at onkur fer at brenna seg**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað vóru dagar, tá ið summarstevnurnar kring landið mest sum vóru friðaðar og livdu sítt egna lív, men soleiðis er ikki longur. Nú er vanligt, at onnur tiltøk verða hildin kring landið, tá ið gomlu summarstevnurnar verða hildnar, og í ár verður tað gróthørð kapping um jóansøku-vikuskiftið.

Neyvan nakrantíð áður hava so nógv stórt tónleikatiltøk verið á skránni í Føroyum somu dagar, sum í døgunum 24. og 25. juni.

Jóansøkan verður hildin á Tvøroyri fyri 80. ferð, men jubileums-stevnan fær av álvara kapping frá øðrum stórum tiltøkum aðrastaðni í landinum.

Sandoyingar hava boðað frá, at teir ætla sær at gera ein nýggjan tónleikafestival júst hetta vikuskiftið, og tað fekk suðuroyingar at svara aftur við enn einum nýggjum tónleikafestivali, sum skal haldast á jóansøku. Harvið koma tveir nýggir festivalar at kappast um fólk á jóansøku.

### Óvanliga nógv annað

Men tað eru ikki bara sandoyingar og suðuroyingar, sum ætla sær at savna fólk seinasta vikuskiftið í juni. Fleiri onnur tiltøk verða á skránni.

Amerikansku gospelsangararnir Russ Taff og Lynda Randle vitja í Føroyum júst tá, og tey skulu hava tríggjar konsertir sama vikuskiftið. Konsertirnar verða í Skálabotni, Havn og í Klaksvík, og nógv verður gjørt burtur úr hesum konsertum, sum verða hildnar bara fáar dagar eftir, at ein annar amerikanskur gospelsangari, Jesse Dixon, hevur havt konsert í Runavík.

Fríggjakvøldið 24. juni verður seinasta innleiðandi umfarið í Nósabarnaprixnum hildið í Fuglafirði.

Leygarkvøldið 25. juni verður finalan í kappingini Ársins Songrødd í Fuglafirði, og serliga ungfólk plaga at hava stóran áhuga fyri hesari kapping.

Og í Klaksvík skal ein Beatles-kopibólkur úr Onglandi hava konsert á jóansøku.

Hetta er tað, sum er komið fram higartil um stór tiltøk, sum skulu verða vikuskiftið 24. og 25. juni, men um áhugin ikki er til tónleik, so ber millum annað til at fara á stóru fótbóltsskúlarnar hjá FSF, sum eisini verða hildnir tá.

### Onkur fær tað trupult

Finn Jensen hevur skipað fyri nógvum stórum tiltøkum í Føroyum, og hann heldur, at føroyingar hava mest sum lopið fram av við øllum tiltøkunum sama vikuskiftið.

– Hatta er garvilt, og tað er stórur vandi fyri, at onkur fer at brenna seg. Og tað kostar at brenna seg, sigur Finn Jensen, sum er lærari á Handilsskúlanum í Havn.

– Tað tykist sum føroyingar ríða á einari bylgju við stórum tónleikatiltøkum, og tiltøkini gerast bara fleiri og fleiri í tali. Soleiðis var eisini einaferð við pylsuvognum í miðbýnum í Havn, men tað gekk ikki hjá øllum.

Finn Jensen heldur, at føroyski marknaðurin er so avmarkaður, at tað ber illa til at hava so nógv stór tiltøk í landinum sama vikuskiftið.

– Tú kanst byrja við, at tað kanska eru góð 50.000 fólk í landinum síðst í juni. Síðani kanst tú taka øll tey burtur av, sum als ikki fara til nakað, og síðani kanst tú dividera tey við øllum tiltøkunum, sum skulu vera. Onkur fer at fáa trupulleikar við at savna fólk hatta vikuskiftið.

– Tað ber illa til at venda peikifingurin ímóti nøkrum ávísum fyriskiparum, tí øll hava fyrireikað seg hvør í sínum lagi, og tí eru so nógv tiltøk komin at liggja samstundis. Men hetta eru nýggjar tíðir, og nú fara summarstevnurnar at fáa tað trupult, tí festivalar og onnur tiltøk fara at kappast við tær, sigur Finn Jensen.

### Tiltøkini

Hesi tónleikatiltøk eru á skránni í døgunum frá 21. til 25. juni

- o Amerikanski gospelsangarin Jesse Dixon hevur konsert í Runavík
- o Innleiðandi umfar í Nósabarnaprixnum verður í Fuglafirði
- o Finalan í Ársins Songrødd verður í Fuglafirði
- o Beatles-kopibólkur spælir í Klaksvík
- o Jóansøkufestivalurin verður hildin á Tvøroyri fyrstu ferð
- o Tónleikafestivalur verður hildin í Sandoynni fyri fyrstu ferð
- o Amerikansku gospelsangararnir Russ Taff og Lynda Randle hava konsertir í Havn, Klaksvík og Skálabotni